Nr. 4  Juni 2015  68 árið

KIRKJULIGT MISSIÓNSBLAÐ

# Kvinnan við Sikarsbrunn

**Partur II**

**Joh. 4, 1 - 43**



# Óuppiborðin felagsskapur við Jesus

Jesus kennir trupulleikarnar hjá hesi kvinnu, men hann veit eisini, hvør loysnin er. Hann veit altíð, hvør loysnin er. Hann veit, hvat hon manglar í lívinum. “Um tú kendi Guds gávu, og hvør tann er, sum sigur við teg: gev mær at drekka, tá mundi tú biðið hann, og hann hevði givið tær livandi vatn.”

“Kvinna, tú hevur meira enn ein likamligan tosta eftir vatni. Tú hevur ein andaligan tosta. Ein tosta, sum bara Gud kann stilla. Tú hevur brúk fyri at fáa lut í Guds gávu. Tú hevur brúk fyri livandi vatni fyri sál tína. Tú hevur brúk fyri mær!”

Jesus brúkar eina mynd, sum vit møta í Jerimia 2,13: Tí at tvær ringar gerðir hevur fólk mítt gjørt: Meg, lindina við livandi vatni, søgdu teir burtur og høgdu sær brunnar við sprungum, ið ikki halda vatni.

Hetta er veruleikin vit liva í eftir syndafallið: Gud, sum er keldan til alt lív, tað lív vit eru skapaði til, hann siga vit burtur. Vit seta annað inn ístaðin fyri hann. Hann, sum kann geva tann kærleikan, sum vit søkja eftir, ta virðing vit søkja, ta meining í lívinum, tann tryggleika og rættvísi vit søkja; hann sum eina kann fylla tað tómrúm, vit hava innan í okkum, hann siga vit burtur, og vit seta okkara álit á okkurt annað. Vit hita kanska okkara køldu sjálvsmynd upp onkra aðrastaðni, sjálvt um hon bara kann hitast upp hjá Guði, í hansara kærleika. Vit trúgva ikki, at Guð kann geva okkum tann tryggleika, sum vit søkja. Tí fara vit til eina aðra keldu, til ein annan brunn, sum lekur og ikki gevur livandi vatn.

Tað er júst hetta, sum kvinnan hevði gjørt. Hon hevði ein tosta, sum hon royndi at sløkkja við nakrar brunnar. Jesus sigur við hana: “Tú hevur havt fimm menn”. Fimm menn!!! Tað er nokkso ógvusligt. Og tann, sum hon nú er saman við, er ikki maður hennara.

Um tað er hon, sum er farin frá einum til ein annan, ella tað er umvent, vita vit ikki. Men vit vita, at hon hevur leitað eftir onkrum, sum hon í síðsta enda ikki hevur fingið. Hon hevur havt ein tosta, og hon helt seg hava rætta svarið. Men hennara loysn miseydnaðist ferð eftir ferð. Hennara menn góvu henni ikki tað, hon leitaði eftir.

Men hon er ikki er greið um, hvør trupulleiki hennara er. Hon fatar einki av tí, Jesus sigur, og er andaliga deyð. “Harri, tú hevur einki at

draga upp við. Brunnurin er djúpur. Hvaðan hevur tú hetta livandi vatnið? Heldur tú kanska, at tú ert størri enn Jákup, sum gav okkum brunnin?"

Hon hugsar, at so leingi hon kann koma út til brunnin at heinta vatn uttan at skula møta menniskjum, so er hon nøgd. So hevur hon fingið tað, sum hon kom eftir. Men Jesus sigur við hana, at ein og hvør, sum drekkur av vatninum úr brunninum, skal tysta aftur.

Jesus vísir á, at tað er okkurt, sum hevur størri týdning í lívinum enn vatn úr brunni. "Tú hevur ein andaligan tosta, sum ikki kann sløkkjast við henda brunnin. Tí ein og hvør, sum drekkur hetta vatn, skal tysta aftur. "Men tann, sum drekkur av tí vatninum, sum eg vil geva honum, skal um ævir ikki tysta; men vatnið, sum eg vil geva honum, skal verða í honum ein kelda av vatni, sum vellir fram til ævigt lív."

Men hvat svarar hon? "Harri, gev mær hetta vatnið, til tess at eg ikki skal tysta og ikki koma higar at draga upp." Hvat hugsar hon um? "Tað hevði verið frálíkt, um eg slapp frá at koma allan vegin hagar eftir vatni. Tað er ein strævin túrur. Tað er eisini so tungt at skula fyrihalda seg til øll hesi fólkini, sum koma út hagar."

Kenna tit hetta? Um Jesus er ein sovorðin jólamaður, sum kann geva mær ymiskt, vælsigna meg og hjálpa mær at fáa góð ummæli í skúlanum og so framvegis, jamen so sigi eg ja takk. Men annars vil eg bara liva mítt egna lív. Eg kenni tað. Ja, eg kenni tað fyrst og fremst í mínum egna lívi. Hvussu lítið eg í roynd og veru vil Guð. Hvussu Guð ikki er málið í mínum lívi. Eg brúki hann bara sum meðal til onnur mál. Í hvussu stóran mun hann má opinbera sín kærleika til mín, áðrenn hann bara fær eitt lítið sindur aftur.

Tað kann tykjast eitt sindur løgið, at Jesus knappliga sigur við kvinnuna: "Far avstað og rópa mann tín og kom higar." Handlar tað nú ikki longur um livandi vatn, Guds gávu og ævigt lív? Jú, men kvinnan sær ikki sín andaliga tørv á hesum. Hon heldur ikki, at Guð er svarið upp á hennara trupulleikar. "Eg vil vísa tær kvinna, hvussu stóran tørv tú hevur á livandi vanti. Eg vil vísa tær tínar avgudar. Tínar følsku brunnar", sigur Jesus.

Hví hevði hon havt fimm menn? Var tað kanska ein tørvur eftir at kenna seg elskaða. Har er onkur, sum elskar meg. Ella var tað kanska tryggleiki? At hava ein sum ansar eftir sær? Ein sum ger hana trygga? Kundi tað havt okkurt við sjálvvirði at gera? At hava ein sum setir teg fremst. Sum setir prís upp á teg. Tað

kann vera nógv. Har var ein tørvur, sum skuldi mettast, men kvinnan leitaði á skeivum staði.

Jesus sigur, at um tú ikki fyrst og fremst setir vón tína til hansara, so fert tú at tysta. Um títt endamál við lívinum ikki er knýtt til hansara, so fert tú at tysta. Um tú ikki fyrst og fremst søkir hansara kærleika, so fert tú at tysta. Og so framvegis.

Eg vóni, at tú elskar og setir prís upp á tína familju. At hon hevur stóran týdning fyri teg. Men um tín familja er tín størsti skattur, tað tú livir fyri, størsta kelda til kærleika, virðing ella meining, so fert tú at tysta. Eg vóni eisini, at tú ert glaður fyri títt arbeiði. At Gud vælsignar teg við einum góðum arbeiði, har tú trívist. Men um títt arbeiði verður lív títt, so fert tú at tysta. Um Guð ikki er tann altavgerandi keldan í lívi tínum, so fert tú at tysta. Ella sagt við øðrum orðum: um tú elskar gávurnar meira enn gevaran, so fert tú at tysta.

Tað kann eisini vera, at tú arbeiðir fyri einari góðari søk, hjálpir menniskjum, tænir í samkomuni. Er tað tað, sum gevur tær eins góða sjálvmynd? Kenslan av at tú ert nóg góður? Um vit royna at sløkkja okkara andaliga tørv við ein brunn, sum ikki er Guds, so fara vit at tysta.

Nógv gera sum kvinnan. Tey ganga alla tíðina frá einum brunni til annan við vón um, at tað man fara at koma. Tey skulu nokk finna tað, tey søkja. Tilvitað ella ótilvitað søkja vit. Tí má spurningurin koma: Úr hvørjum brunni heinti eg vatn? Hjá Jesusi? Um alt annað miseydnast, um familjan fer í sor, arbeiðsloysi kemur, heilsan fer, havi eg so mist lív mítt? Ella er Jesus eisini nóg mikið tá?

Vit skulu gleðast um Guðs gávur. Vit skulu njóta alt tað góða. Tað er eins týdningarmikið at sláa fast. Men tað jarðiska má ikki gerast so avgerandi, at vit hava størri tørv á tí enn Guði.

Tora vit at viðurkenna okkara avgudar? Kvinnan vísir, hvussu ringt vit hava við tað. Jesus mátti vísa henni tað. Legg til merkis, at tað er ikki hon, sum fortelur, at hon hevur havt fimm menn. Tað er Jesus, sum sigur tað. Hon svarar bara: eg havi ongan mann. Er tað nakað galið í tí? Er tað nakað galið í ikki at hava ein maka? Nei sjálvandi ikki. Eingin fer at hugsa, at eg havi havt fimm menn, um eg svari, at eg havi ongan mann. Tí haldi eg, at Jesu háttur at svara henni aftur avdúkar, at kvinnan roynir at goyma allan sannleikan aftan fyri ein einkultsannleika.

Jesus sigur “rætt segði tú: eg havi ongan mann. Tí at tú hevur havt fimm menn, og

tann, sum tú nú hevur, er ikki maður tín. Hetta hevur tú sagt satt."

"Eg síggi, at tú ert ein profetur." Hon hugsar óivað: "Kanska skuldi eg havt sagt, sum var beinanvegin." Eg haldi nevniliga ikki, at Jesus rósar henni. Hann vísir henni hennara synd.

Men hon er ikki so glað fyri at tosa um sína fortíð og er tí skjót at skifta evnið: "Fedrar okkara tilbóðu á hesum fjallinum, og tit siga, at í Jerusalem er staðurin, har sum tað eigur at vera tilbiðið."

Bartall Gregersen



# Andakt



Men tollarin stóð langt burturi og vildi enn ikki hevja upp eygu síni móti himli, men sló seg fyri bringuna og segði:” Guð náði meg syndara!” Lukas 18.13

Hetta er húsagangsbønin. Men hon er eisini frelsubønin. Uttan hana eru vit glataði. Við henni kemur tú á mál.

Tí ger Satan alt, hann kann, so bønin ongatíð verður hjartabøn tín. Hann leggur einki í, at tú ert andaliga áhugaður og ein kristin í eygunum á øðrum. So leingi, sum tú ikki ert farin á húsagang við øllum tínum, so Jesus kann frelsa teg sum glataðan, ert tú enn ogn hansara. Tað er øðrvísi tann dagin, tú kanst sláa teg fyri bróstið og siga við frelsara tín: Guð náði meg syndara. Tann dagin er rúm í hjarta tínum fyri frelsuni.

Hevur tú tikið ímóti frelsuni, ger Satan alt fyri at tú skalt hugsa um, hvat tú skalt gera, og hvussu tú skalt vera sum ein kristin. Hann vil, at tú skal bera teg saman við onnur og ikki spegla tær í teimum mongu bíbliuorðunum, sum døma teg. Hann vil flyta teg burtur frá húsagangsbønini. Eydnast tað honum, so hevur tú mist alt.

Verð í veruleikanum, sum hann er: Sjálvt tað besta hjá mær og tær er fongt við synd. Tað einasta, sum ikki er tað, er Jesus. Standa vit framman fyri honum í okkara armóð, frelsir hann okkum. Tað er byrjanin upp á kristinlívið, tað er framhaldið, og tað er fyllingin.

H.E. Nissen: Han er vor fred

Sólvá Syderbø umsetti

# Fællesbrev nr. 119
# Arusha 5/5 2015

## Etiopisk, japansk, græsk, dansk, tanzanisk…..

### Dansk og etiopisk

Emma er kommet, så vi sneg os til at få **dansk mad** en aften Arve og Ingrid Myra og den nye direktør i Soma Biblia, Odd Geir Nordland, var på besøg. Frikadeller. Først boede Emma i volontørboligen, nu bor hun hos os, indtil hun får sit eget. En aften var vi inviteret til spisning hos Ingrid, og da hun havde hørt, at vi på Færøerne var vant til at spise ingera be wot (**etiopisk mad**) hos tidligere ethiopien-missionærer, ja, så havde hun bestilt det fra en etiopisk restaurant i Arusha.

### Japansk og græsk

Arbejdet kalder og der ligger meget, der skal samles op nu. Det må så komme skridt for skridt. Soma Biblias hovedkontor ligger i Dar es Salaam på Luthersk Missionsforenings compound, mens forlaget ligger i Arusha på Norsk Luthersk Missionssambands compound. Den daglige ledelse består af direktøren, og de tre ledere for økonomi, salg og forlag. Med jævne mellemrum skal der være ledelsesmøder, og det var da lidt af en udfordring at sidde i Arusha som den eneste og prøve at være med over skype. Så var det lidt lettere da Soma Biblias bestyrelse holdt møde i Dar es Salaam, hvor alle mødte fysisk op (heraf to fra Danmark). Fredag d. 24/4 gik turen til Dar, og d. 25/4 var der så bestyrelsesmøde hele dagen. Og så var der en, der inviterede på **japansk** restaurant om aftenen. Søndag morgen 6.00 kørte jeg, Peter, med en bogsælger til en luthersk kirke, hvor han skulle sælge, mens jeg skulle bringe en hilsen fra Soma Biblia ved de to gudstjenester. Op imod 6 timer på kirkebænken, så kan man vist godt sige, at man har været i kirke. Men det var en opbyggelig dag, der endte med, at vi, der var tilbage efter bestyrelsesmødet, spiste ude på en **græsk** restaurant.

### Tanzanisk

Week-enden efter stod den på god **tanzanisk** mad (dog ikke majsgrød), da alle Soma Biblias medarbejdere fra Dar es Salaam, Iringa, Mbeya, Mwanza og Arusha var samlet til medarbejderkursus på et katolsk center lige uden for Arusha ejet af 'The Daugthers of Charity', en orden stiftet af Magdalene fra Canossa. Et fint center med masser af plads. Der var 7 søstre og et antal novicer, dvs. unge piger der er i træning til at træde ind i ordenen. Trods de hvide Soma Biblia medarbejdere blev det meget tanzanisk, da en tanzaner stod for de dage, der var undervisningstimer. Så det kørte meget ud i ét med få korte pauser… Kurset varede fra torsdag aften til mandag morgen. Men der blev også tid til lidt snak, lidt leg og tur om søndagen til Lake Manyara National Park. Det var en flok virkelig dedikerede medarbejdere, hvoraf der både var nogle, vi har kendt gennem mange år, og andre der var nye ansigter for os. Soma Biblia har lige udgivet en ny børnebibel på swahili, så Per Jerup, der står for salgsafdelingen, har fået

lavet en pokal 'Soma Biblia 2015', som den afdeling ville vinde, der solgte flest børnebibler de næste 4 måneder…

**De kommende dage**

Hvad gør man, når lige får ansvaret for udgivelsen af et børneblad (Twende); et magasin for præster og evangelister (Riziki); en ordentlig stak bøger, der skal vurderes; to forlag, der skal slås sammen; og en del bogprojekter, der er  undervejs, og 117 ting, der skal fås klarhed over, skaffes til veje og organiseres i ét forlag, og meget mere... Man trækker vejret en ekstra gang, og prøver i første omgang at få overblik og organisere det hele jo om, at Guds Ord kommer ud og at Guds Ord også gennem de forskellige bogudgivelser bliver til hjælp for mennesker. Og når man går med en T-shirt, hvorpå der står: Jesus elsker dig (Yesu anakupenda), så er det ikke anderledes i Arusha end andre steder i Tanzania: Du får hele tiden fortalt, at Jesus elsker dig, af folk på gaden. Og det er jo det, vi gerne vil have at alle hører: Jesus elsker dig.





Kærlig hilsen

og Guds fred

Anne-Lene og Peter

# Eitt er neyðugt

Tá eg gekk á realskúla, var Hans Kristian Hansen flokslærari mín. Hann undirvísti í støddfrøði og týskum. Tað var hann sum gav mær ein ófrið í mítt hjarta, sum fylgdi mær í trý ár, inntil eg bleiv ein kristin. Hansen var føddur 1918 og doyði í 1990. Hann var eisini útbúgvin gudfrøðingur. Harafturat, hevði hann gott oyra fyri tónleiki. Hann dugdi væl at spæla violin og plagdi at spæla til samkomur á skúlanum. Seinni bleiv hann skúlastjóri.

Á Hurdal Verk, sum skúlin at, var andakt hildin hvønn morgun í skúlastovuni. Hansen lærari hevði tær flestu. Andaktirnar høvdu ikki stórvegis ávirkan á meg. Hann var eingin stórur talari, men mær dámdi hann væl. Hann var nærlagdur og dugdi væl at undirvísa. Harumframt var hann hittinorðaður og altíð skjótur við einum aftursvarið.

Hann syrgdi fyri, at vit høvdu ein góðan felagsskap í flokkinum.

Vit brúktu minnisbøkur. Øll vildu hava eina heilsan, bæði frá næmingum og lærarum. Eg eigi mína bók framvegis. Eg hevði í roynd og veru vænta mær eina øðrvísi heilsan frá Hansen lærara, enn hana eg fekk.

Vit sótu annars væl um sátt og støddfrøði var lærugreinin mær dámdi best. Tí var eg í fyrstani eitt sindur vónbrotin um tað hann skrivaði.

Har stóð: ”Eitt er neyðugt! Takk fyri góða samveru”. Mær dámdi ikki hesa heilsanina, tí eg skilti alt ov væl, hvat hann meinti við – at eg mátti fáa míni viðurskifti við Gud í rætt lag. Men hetta órógvaði meg, tí eg visti, at hann hevði rætt. Eg visti, at eg ikki var trúgvandi og at eg mátti blíva tað. Eg visti at tað var neyðugt.

Hevði hann veruliga rætt? Kann eitt hampafólk, sum altíð skikkar sær væl, ikki møta Gudi við frímóð? Nei, tað er tað sum er trupulleikin. Eg visti, at Gud er ein heilagur Gud og at eg ikki kann møta honum, uttan at hava Jesus , sum mín frelsara og talsmann. Eg visti, at míni viðurskifti við Gud, vóru avgerandi í ævinleikanum. Eg kendi til alt hetta, longu tá eg var 16 ár og fekk hesa heilsanini í minnisbókina. Hetta gav mær ófrið í hjarta. Við hesum ófriði viðførinum, byrjaði eg at lesa til student sama heystið. Eg búði á Kostdeildini tað fyrsta árið.

Har var onki, sum kundi minna meg um kristindóm. Hetta ávirkaði meg. Har var ongin, sum minti meg á tað eina, sum var fyri neyðini. Hóast tað, hugsaði eg ofta um tíðina á realskúlanum. Ikki soleiðis at skilja, at eg hugsaði um Hansen lærara og tað eina neyðuga hvønn dag. Men eg var ongantíð á møti, ella til gudstænastu, hesi trý árini, eg gekk á studentaskúla.

Hesa tíðina var eg líkasælur. Men heilsanin frá Hansen, var har framvegis, hana slapp eg ikki frá. Av royndum veit eg, at tað skulu ikki meira enn trý orð til, fyri at vekja eitt menniskja, til at umhugsa sína støðu, sálini viðvíkjandi!

Men onkur má siga hesi orðini. Hansen tordi og tað eri eg honum takksamur fyri.

Tað er umráðandi, at vit hava umsorgan fyri tí einstaka. Tað er so lætt at fylla tíðina, ja alt lívið við tí jarðiska og gloyma tað sum veruliga er neyðugt. Vit mega biðja Gud um veking.

Kanska tú sum lesur hetta, ikki hevur fingið tíni viðurskifti við Gud í rætt lag.

Henda heilsanin ert til tín.

Asbjørn Nordgaard.

Lea Juul Týddi.

# Endatíðin

"Men mangir verða skírdir; reinsaðir og royndir; gudleysir fara fram í gudloysi; og eingin gudleysur skilir tað; men hinir vitru skulu skilja tað." (Dánjal 12, 10). Hin síðsti kapittulin í Dánjalsbók er ein av teimum merkisverdastu kapitlunum i allari í bíbliuni. Her er nakað loynt og myrkt, tað sigur vers 9. Tí orðini skulu vera goymd og innsiglað, hagar til endalyktin kemur.

Her verður talað um endatíðina, um uppreisnina og dómin. Tann, ið vísti seg fyri Dánjali, var i línklæðum, tveir aðrir stóðu hvør a sínum áarbakkanum; annar spyr, hvussu langt er enn til endan a hesum undursomu lutum. Hann sigur eina tíð, tvær tíðir og hálva tíð; tá ið vald hans, ið sorar hina heilagu tjóð er at enda, tá man alt hetta koma fram, men profeturin skilti tað ikki. Henda kunngering úr Dánjalsbók er i samsvari við Jóhannesar Opinbering kap. 22 vers 11-12. Tann, sum ger órætt, haldi fram via at gera órætt, og hin óreini haldi fram við óreinsku síni, og hin rættvísi haldi fram við rættferð síni og hin heilagi haldi fram við halgan síni!

Sí, eg komi skjótt, og løn mína havi eg við mær til at gjalda einum og hvørjum, sum gerningur hansara er. Alt hetta sigur okkum, at endin er nær. Okkara tíð er farin at líkjast hesum spádómi. Tað síggja øll eygu, sum vilja síggja. Tað boðar stríð fyri tann trúgvandi, vit síggja Guðs náði, við framgongd fyri Guðs ríkið.

Hinvegin síggja vit vantrúgv, avnoktan av Guðs orði eisini i okkara landi.
Jesus sigur: Eg komi skjótt. Máttu vit sum Maria valt hin góða lutin, sum eisini var lovað Dánjali, tá ið dagarnir eru uppi.

Náði Harrans Jesu verið við øllum!
Jústinus Poulsen

.

# Tá Gud hjálpir

Ein maður vitnaði niðri á Blákrosskaféini:

Eg eri bóndi. Ein dagin skuldi eg fara eftir nøkrum seyðum. Eg fór á fýrahjólstrekk og hevði sonin við mær. Tað gekk illa. Vit endaðu næstan uppi yvir Vestmanna; men vit fingu at enda fatur á teimum fýra seyðunum, sum vit skuldu taka. Hetta var í heyst, og skjótt myrkir. Tá ið vit vóru á heimleið við viðfestisvogninum og seyðunum, koyrdi eg út av einum hamri. Sonurin gekk nakað frammanfyri.

Eg fekk líka stundir at rópa "Jesus". Eg sá, hvussu súkklan fleyg beint uppi yvir mær. Harrin hevði gjørt tað soleiðis, at eg lá niðri í einari kullu. Súkklan vigar um eini 400 kg. Eg lá óskaddur har, meðan alt hitt fór í smildur. Eg var rættiliga skelkaður og lá og summaði meg.

Tá ringir fartelefonin. Tað er konan. "Hvussu hevur tú tað? Er nakað hent?" spyr hon.

Eg orkaði illa at tosa við hana, tí skelkurin var so mikið stórur, so eg segði bara: "Eg havi tað gott."

So spyr hon sama spurning eina ferð afturat, og eg gevi sama svar.

"Nei," svarar hon. "Okkurt er áfatt, tað merki eg skilliga."

So mátti eg siga, hvat var hent, og at súkklan var farin í smildur, men vit báðir vóru óskaddir.

Hevði Gud ikki gripið inn, so var eg ikki her í dag. Eg hevði farið í smæsta smildur av hasari tungu vektini. Tað er so gott at befalla seg í Guds hendur. Hann eigur æruna fyri alt.

Effie Campbell.



# Gud brúkar síni

Ein kona vitnaði niðri á Blákrosskaféini:

Ein pápabeiggi mín, sum búði á Sandi, upplivdi einaferð nakað sjáldsamt. Ein dagin, tá ið hann fór til útróðrar, legði hann seg uttan fyri Skarvanes. Hann skuldi beint fara at kasta, tá ið hann hoyrdi eina týðiliga rødd siga við seg: ”Fiskin, sum tú fært í dag, skalt út avreiða, og pengarnar skalt tú lata til ein drong í Skopun, sum skal á bíbliuskúla!”

Pápabeiggin var einsamallur á báti, so hann visti, at hatta var Guds rødd. Hann gjørdi, sum hann hevði fingið boð um. Tá ið hann hevði avreitt, koyrdi hann pengarnar í ein brævbjálva. Hann kendi ongan drong í Skopun, sum skuldi á bíbliuskúla. Men hann fór til Skopunar og spurdi seg fyri. ”Jú,” søgdu tey, ”her er ein drongur, sum samlar sær pening at fara á ein bíbliuskúla í Onglandi.

Hann leitaði so drongin upp og gav honum pengarnar. Tá vísti tað seg, at tað var upp á oyra júst tann peningaupphæddin, sum manglaði í. Hesin drongurin hevur verið eitt yndisligt amboð í Guds hond, og mong eru frelst gjøgnum hansara virki.

Effie Campbell.



## Ein eingil í kavanum

Eru einglar bara okkurt, sum vit klippa út úr pappíri og heingja á jólatræið – ella eru einglar av sonnum til? Bíblian sigur, at einglar eru til. Einglar í túsundatali – fleiri enn vit kunnu telja. Teir eru skaptir, eins og vit eisini eru skapt, og teir eru Guds sendiboð.

Fyri mongum árum síðani búði Louise Dubay í Anchorage í Alaska. Hon var ein eldri kona, og fleiri heilabløðingar høvdu gjørt bein hennara so veik, at hon fekk illa gingið. Í smáttuni, har hon búði einsamøll, var ein brenniovnur, og hann hitaði smáttuna. Vinir hennara plagdu dagliga at støkka inn á gólvið at bera henni brennivið og kyka.

Men ein kaldan morgun í februar mánaði kom eingin. Hon hevði onga telefon, og í neyð sínari fór hon at biðja hart til Guds, at hann mátti senda henni hjálp. Tá ið tað gjørdist øskukalt, kólnaði skjótt inni í smáttuni. Úti vóru 35 kuldastig, og hon visti, at sjálvt um hon ballaði seg inn í fleiri teppi, fór hon skjótt at stirðna í hel, um eingin kom, sum kundi bera brennivið inn og kyka.

Hon helt á at biðja, men eingin kom. So fór hon at biðja øðrvísi. Staðin fyri at biðja Gud senda hjálp, segði hon Gudi, at um tað var hansara vilji, at hon skuldi doyggja, so var hon til reiðar.

Meðan hon bað, fóru dyrnar upp, og ein høgur, ungur maður kom inn við føvninginum fullum av brenniviði. Hann legði brennið í brennikassan og fór at kyka í ovninum. Tá ið eldurin kyknaði, koyrdi hann vatn í ketilin og setti hann útá, og síðani fór hann út og kom inn aftur við enn einum fullum føvningi av brenni.

Meðan alt hetta fór fram, vendi hann alla tíðina høvdinum so, at hon ikki sá andlit hansara, og hann hevði ikki enn sagt eitt einasta orð.

Frú Dubay var bæði ovfarin og bangin. Hon tordi einki at siga, men hon vildi so fegin spyrja hann, um hann var ein eingil. Hon setti spurningin fram í tonkum sínum uttan at siga hann hart. Tá vendi hann sær á, smíltist til hennara og nikkaði játtandi. So vendi hann sær á aftur, læt dyrnar upp og fór.

Eina góða løtu sat frú Dubay mest sum runnin í stein. At enda segði hon stillisliga fram fyri seg: ”Um hann var ein eingil, sendur av Gudi, so eru eingi fótafet í kavanum uttan fyri hurðina.”

Hon stríddi seg út úr songini, hinkaði við stríði og strevi yvir til dyrnar og læt upp. Uttanfyri lá kavin sum eitt ónortið teppi. Har vóru eingi fótafet. Kavin var heldur ikki traðkaður niður uttan um stakkin við brenniviði. Tá ið hon læt hurðina aftur í sínari lítlu smáttu, visti hon, at Gud elskaði hana, og at hann hevði sent ein av einglum sínum at hjálpa henni í einari neyðstøðu.

”Adventnyt”

Effie Campbell umsetti.

# Frelsan er fríð

Hoyrið! Komið higar øll, ið tysta, og fáið vatn, komið hvør, sum einki silvur eigur, keypið korn og etið fyri einki, keypið vín og mjólk fyri einki.” Jes. 55,1.

Soleiðis rópti Jesaja til Ísrael fyri at sannføra tey um, at frelsan var frí. Hon er frí fyri øll, eins frí nú sum á døgum gamla Ísraels. Og kortini, sum tað eru frá, sum trúgva tí, sum tey eru fá, sum taka ímóti Guds gávu! Sum tey eru fá, sjálvt millum børn hansara, millum eftirfylgjarar hansara, sum taka ímóti øllum, sum Gud hevur at bjóða! Hann gevur okkum ikki bert angur og fyrigeving, men frið og gleði og trúgv, sum vil fría okkum frá allari gremjing, ótta og óvissu. Hann vil fylla okkum við Heilaga Andans fylling, um bert vit loyva tí. Staðin fyri stríðast vit fyri at gera okkum verdug til hana ella lata bara sum einki.

Einaferð, tá ið dýrtíð var í London fyri mongum árum síðani, gekk ein sølumaður runt í gøtunum í tí fátæka partinum av býnum og rópti: “Sildir! Tríggjar fyri ein penny (8 oyru),” men eingin keypti so mikið sum eina sild, tí eingin átti so frægt sum ein penny.

Ein blídligur maður, sum kom framvið, keypti allar sildirnar og segði við sølumannin, at nú skuldi hann aftur fara oman eftir gøtuni og rópa: “Ókeypis sildir! Fínar, góðar royktar sildir fyri einki!”

Tað gjørdi hann, men fólk trúðu honum ikki. Hann sá eina konu sita í vindeyganum og segði: “Gerið so væl, tygum, sildir fyri einki, eitt framúrskarandi høvi hjá tygum, komið og fáið tygum.”

Konan risti vantrúgvin við høvdinum. “Á, tann tápulingur,” mutlaði sølumaðurin. “Men soleiðis fara ikki øll at bera seg at.”

Men tað gjørdu tey kortini, og hann fór aftur til hin fremmanda mannin uttan at hava givið eina einastu sild til nakran.

“Latið okkum báðar royna saman,” segði maðurin. So róptu báðir: “Sildir fyri einki! Er nakar, sum vil hava sildir ókeypis?”

Fólk vóru bilsin av at síggja ein fínan harra í teirra gøtu; men tey fingu seg ikki at trúgva, at tey fingu sildir ókeypis. At enda komu maðurin og seljarin til ein flokk av smádreingjum, sum vóru kryplingar, kloddutir og svangir. Teir hoyrdu rópið: “Sildir fyri einki,” og teir trúðu tí. Teirra ágrýtnu framraktu hendur blivu fyltar við sildum, til hin seinasta var farin.

Nú savnaðust tey, sum høvdu ivast, rundan um teir og bóðu um sild; men ov seint var. Millum tey vónsviknu var hin konan, sum hevði sitið við vindeygað. Hon segði: “Eg trúði ikki, at tit meintu hetta í álvara.”

“Nú mást tú sita svong fyri tína vantrúgv,” segði sølumaðurin. Frelsan kostaði Himlinum nógv, ja, lívið hjá Guds soni. Hann rindaði av fríum vilja og við gleði kostnaðin. Í umleið seks túsund ár hevur Gud sent sítt orð við sínum boðberum og bjóðað fyrigeving fyri einki, frið fyri einki, frelsu fyri einki! Ein dag fer tilboðið at verða tikið aftur. Men í dag kunnu vit koma og fáa hetta uttan pengar og uttan at rinda nakað.

Effie Campbell umsetti.

## Dávid kongur

Dávid var tredivu ára gamal, tá ið hann gjørdist kongur, og hann stýrdi landinum til hann doyði, hálvfjerðs ára gamal. Sostatt var hann kongur í fjøruti ár. Í byrjanini gekst honum væl. Fyrst royndi hann at savna ísraelsfólk. Eingin av teimum tólv ættunum átti Jerusalem, so hann tók staðin, og gjørdi hann til høvuðsstað og miðdepil fyri átrúnaði og politikki. Síðani tók hann londini, sum hóttu Ísrael, og so var friður hjá honum at arbeiða.

Tað fór kortini at ganga aftur á hond hjá Dávidi, tá ið hann fekk sær Batsebu til konu. Batseba var ein sera vøkur kvinna. Hon var gift við einum manni, sum æt Uria. Hann var ein av hermonnunum hjá Dávidi og hevði altíð verið honum sera trúgvur. Í bardaga ímóti ammonitum, bað Dávid herføraran Jóab seta Uria, har sum bardagin var harðast. Uria doyði í bardaganum, og Dávid fekk sær Batsebu til konu. Tað dámdi Guði ikki og revsaði Dávid. Dávid bað um fyrigeving, og Guð fyrigav honum, men tók ikki revsingina aftur. Fyrsti sonurin, sum Dávid og Batseba fingu, doyði. Hetta tók Dávid sær sera nær.

Seinni upplivdi Dávid, at sonur hansara Absalon sveik hann. Hann royndi at taka ræði av pápanum fyri sjálvur at gerast kongur. Dávid mátti senda ein her ímóti honum og hermonnum hansara. Hann bað eftir, at Absalon ikki mátti doyggja, men tá ið hann doyði, varð Dávid sera keddur.

Tað sæst eisini í sálmunum í Gamla Testamenti, sum Dávid hevur yrkt, at lív hansara bæði var merkt av neyð, sorg, gleði og takksemi. Hann var ikki fullkomin og syndaði ofta, men hann angraði synd sína, vendi sær til Guðs, bað um fyrigeving og var Guði takksamur fyri miskunn og styrki.

Tá ið Dávid doyði, hálvfjerðs ára gamal, var hann enn í Guðs varðveitslu, og støðan í landinum var góð. Sonurin Sálomon arvaði eitt stórt og sterkt ríki eftir hann.

**Á næstu síðu stendur sálmur 121 í Gamla Testamenti, sum Dávid hevur yrkt. Í sálminum yrkir Dávid um, hvussu væl Guð hjálpir og verjir hann.**

**Nøkur orð eru tikin burtur úr sálminum. Setið tey inn aftur. Um tit ikki minnast til, hvørji tey eru, kunnu tit blaða upp í Bíbliuni og finna tey.**

v1 Eg eygu míni __ __ __ __ __ til fjallanna upp, hvaðani kemur mín __ __ __ __ __? v2 Hjálp mín frá __ __ __ __ __ __ __ __ kemur, skapara himmals og jarðar. v3 Hann vil ikki lata fót tín __ __ __ __ __, vaktari tín vil ikki sova. v4 Nei, ikki blundar og ikki svevur __ __ __ __ __ __ __ __ __ Ísraels. v5 Harrin er __ __ __ __ __ __ __ tín, Harrin tín verndarskuggi við tína høgru hond. v6 Um dagin skal __ __ __ __ __ ei stinga teg, ella um náttina __ __ __ __ __. v7 Frá øllum illum skal Harrin teg __ __ __ __ __, hann tína sál skal varða. v8 Tín __ __ __ __ __ __ og inngang skal Harrin varða nú og um allar __ __ __ __

Útgevari
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
Fo- 100 Tórshavn
t- postur: kmf@kmf.fo

Heimasíða: www.kmf.fo
Ábyrgd: Kristian Thorleifsson
tel: 212856
Prent: KMF
Konta: 9181- 495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
(februar, mars, mei, juni, august
september, november og desember
Haldaragjald: kr. 200,00